

Rune Bjerke, forstjóri í DNB. Mynd: DNB

# Kreppan í oljuvinnuni kann kosta banka fimm milliardir krónur

**Jógvan Hugo Gardar**

26.11.2015 - 14:30

Oljan.fo

Stjórin í norska bankanum DNB, Rune Bjerke, sigur at tey fyrireika seg til at missa fimm milliardir í frálandavinnuni. Í samrøðu við Dagens Næringsliv sigur Bjerke at framtíðin hjá norsku oljuvinnuni sær alt annað enn bjørt út. Orsøkin er at oljuprísurin er farin meir en í helvt hetta farna árið.

- Vit rokna við at vit fara at missa uppá lán til í frálandavinnuni. Serliga rokna vit við at fleiri fyritøkur innan frálandavirksemi og veitingarvinnuna sum bjóða seg fram í oljuídnaðinum fara at fáa stórar trupulleikar, sigur Rune Bjerke.

DNB hevur kannað nærri lán fyri góðar 60 milliardir krónur til frálandavinnuna. Meginparturin er lán til boripallar og frálandaveitingarskip, og hesi økini óttast bankin kann verða raktur

meinast. Í ringasta føri roknar bankin við at eini tíggju prosent av lánunum ikki koma innaftur.

- Men tá er talan um rættuligt ódnarveður í oljuvinnuni komandi árini, sigur Harald Serck-Hanssen, stjóri fyri stóru kundarnar hjá DNB. Hann vísir á at bankin undir fíggjarkreppuni misti tað sum svaraði til tvey prosent av útlánunum orsakað av húsagangum, og støðan er verri í oljuvinnuni í dag. Hann leggur afturat at hann álíkavæl ikki trýr at tað skal fara at ganga so illa.